

# BLÍÐSKAPUR OG MET Í SEYÐISFIRÐI

**Í SØGULIGUM HÚSI Á SEYÐISFIRÐI SKRIVAÐI RÁS2 SØGU**



ÚTVARP
Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo

Vit vóru trý fólk frá Rás2, sum fóru við Norrønu annan páskadag fyri at skriva søgu. Rás2 hevði ongantíð áður sent beinleiðis úr Ìslandi. Unga rásin, sum bert gongur á triðja ári hevur áður bandað nøkur innsløg úr Ìslandi, men nú skuldi tann stóra íslendska verkætlanin flotast. At vit fóru annan páskadag er kanska akkurát innanfyri sannleikans gátt. Vit fóru beint eftir midnátt, tá boðað verður frá tí degi, har páskaregg verða rullaði í Føroyum. Páskaregg vóru kortini nóg mikið av umborð á Norrønu, og tað rullaði eisini nakað. Skiparin, Sverri Kjærbæk úr Vági framskundaði fráferðina 13 tímar, sum í síðsta enda kom væl við hjá okkum, sum skuldu senda av Seyðisfirði. Dugnaligu ungfólkini Mirjam Pætursdóttir, Alvin Ellebye Andersen og undirritaði, sum nú má ásanna, at ein er komin í tann aldurin, har ein nú hálar miðalaldurin upp fóru fyri Rás2. Okkum í fylgi var Eiler Einarsson, sum er rituvíkingur av íslendskari ætt. Eiler Einarsson er royndur campingmaður, og hann dugdi væl at seta orð á tær framúrskarandi camping-umstøðurnar í Ìslandi, og tær minni góðu camping-umstøðurnar, sum eru í Føroyum. Á túrinum høvdu vit gott samstarv við Svein í Heiðunum frá marknaðardeildini hjá Smyril Line, sum hjálpti okkum at koma í samstarv við føroyingar á Seyðisfjarðarleiðini, og við íslendingar, sum eru búsitandi á Seyðisfjørðinum, og sum høvdu eina viðkomandi søgu at siga.

## Inni ella útikavaði?

Undirritaði, sum hevur verið búsettur víða í norðurlondum hevur tíðum roynt at verið innikavaður, orsaka av stórkava. Komin til Seyðisfjarðar hevði eg á fyrsta sinni í lívi mínum tað marghåttligu upplivingina at verða innikavaður, ella kanska heldur útikavaður umborð á einari stórari ferju. Vit høvdu ætlanir at taka teinin frá Seyðisfjørðinum til Egilsstaðir fyri at fáa ein bitri bita, men vit máttu bíta í tann súra kavan. Boðað var frá gjøgnum hátalarakervið umborð á Norrønu, at vegurin millum Seyðisfjørðin og Egilsstaðir var stongdur orsaka av stórkava. Og onkrastaðni er tað væl logiskt, at yvirtíð halgidagar eisini er dýr í Ìslandi, og tí var ikki grivið. Dagin eftir var tó slóðað fyri, at vit kundu fara til Egilsstaðir. Gravitólini vóru líka stór sum hernaðarligir stríðsvagnar, og var tað imponerandi at síggja effektivu kavaruddingina.

## Seyðfirðingar

Fólkini sum eru búsett á Seyðisfirði verða nevnd seyðfirðingar. Seyðfirðingar vóru fegnir um, at "færeyskt útvarp" – í hesum førinum Rás2 sendi sendingar beinleiðis av Seyðisfirði. Tey 35 árini Smyril, Norrøna 1 og nýggja Norrøna hava siglt í rutusigling millum Føroyar og Seyðisfjørðin høvdu tey ikki áður upplivað, at "færeyskt útvarp" - komersielt ella alment hevði sent frá bygdini, sum er teimum so kær. At vit sendu útvarp frá heimstaði teirra, vóru seyðfirðingar ikki so lítið stoltir og hugtiknir av. Undirritaði hevur koyrt runt alt Ísland. Hóast ein ikki kann finna nóg mikið av lýsingarorðum at lýsa framúrskarandi vøkru náttúru íslendinga, og blíðskapin einum er fyri í tí søguríka bróðirlandinum í norðuri, so er kortini eitt at ilskast um, einamest hjá teimum sum varða av bygdunum. Ìslendsku bygdirnar eru ikki eins vakrar, og søguliga varðveittar, sum tær føroysku bygdirnar. Hetta kann ein rita við góðari samvitsku, tí mangir íslendingar hava sjálvir borið hetta uppá mál. Í nógvum íslendskum bygdum eru eingi hús at finna, sum eru frá tíðarskeiðnum áðrenn seinna veraldarbardaga. Seyðisfjørður er eitt ógvuliga jaligt undantak í so